gult cyan magenta svart

Akademikari úr skugganum

Akademisk Forlag gav í gjár út danska bók um bosnisku flóttarnar úr Eysturslavonia. Stórsti partur av hesum flóttum eru teir, sum búgva í Føroyum.

Danska bókin nevnist "Ikke kun om søndagen" og rithøvundur er 36 ára gamli Carsten Lunding, cand.polit. og fyrrverandi rá›harraskrivari. Lovandi lívslei›ina á teim bona›u gólvunum í fíggjar- og undirvísingarmálará›num hevur Carsten lagt afturum seg og fæst í dag vi› at matgera.

Í sta›in fyri at vera vælløntur ghostwriter fyri rá›harran, hevur Carsten kent ta› ney›ugt at stíga úr skuggatilveruni á Slotsholmen. Hann er farin at skriva um tey "stóru menniskju í sivilsamfelagnum", sum hann sigur.

Torført er at kn‡ta samband millum høgt lærdar akademikarar á Slotsholmen og so vanlig menniskju, sum eg havi møtt eftir sonevnda Leif Bork Hansen-máli›. Hetta eru stór, stór menniskju, sum hava so nógv at geva — men vit taka tey ikki í álvara", sigur hann yvir dampandi gr‡tunum.

Í bókini grei›ir Carsten Lunding frá um rættarmáli› móti danska prestinum, sum kemur fyri í Eystara Landsrætti 30. oktober, og um serbisku flóttafólkini, sum sóktu fri›skjól, tá tey komu á prestagar›in hjá honum í Lyngby á heysti 1998.

Gongdin ver›ur l‡st fram til í dag, nú flestu av teim 29 flóttafólkunum eru komin til Føroya, me›an nøkur teirra fóru til Svøríki og Spania.

Umframt stakmáli› um prestin í Lyngby vi›ger› bókin hugtaki› sivilt ól‡dni og fólkaræ›i í dagsins samfelag.

Alnetsmentan

Tá teir bá›ir rithøvundarnir, Nathaniel Wice og Steven Daly, góvu út bókina "alt.culture", fóru teir at n‡ta alnótina til tess at gera vart vi› bókina.

Sølufremjandi sí›una løgdu teir ikki ni›ur, men hava stø›ugt økt um hana. Í dag kann heimasí›a teirra www.altculture.com metast sum ein alfrø›i, i› umrø›ur allar hugsandi partar av dagsins fólksligu mentan, eins og talgildar mi›lar fyrr og nú. Vi› her›ing á beint nú.

Til ber at leita fram eftir fummum, ella eftir bókstavara›num. Harumframt er eisini ein "sjálvst‡rari" á sí›unu, sum ávísar tí›ir kann seta teg inn í úrvald vi›urskifti á heimsins samansetta mentunarpalli.

Máli› er enskt, og leita vit eftir Faroese, finna vit einki. Men leita vit eftir Danish, so finna vit eina áhugaverda grein um Barbie-dukkur og Barbie-mentanina vi› fleiri tilvísingum. Leita vit eftir William Heinsen, finna vit einki, men ver›a førd innar í tykisheimin hjá William Burroughs, cyberpunk og the Anarchists' Cookbook. Og ikki um at tala, um vit leita eftir rokkbólkinum U2, ella hava hug at kanna mentunarlig tónleikarák, sum eitt nú grunge. Tá er hópurin av tilfari.

Washington Post gevur heimasí›ini sko›smáli› "an exhaustive ecyclopedia of the cultural edge", me›an blø›ini G.Q., Wired og Q n‡ta hesi or› um n‡ggju mentunarligu nettænastuna: "Sharp", "definitive" og "unpatronizing". Av sonnum ein mentunarlig samtí›arkumpass í tiltakandi tykisheimi okkara.

Kosmiska rúmi› hjá Tróndi hevur valla møguleika at pr‡›a farstø›ina í Kastrup Lufthavn, tí fer›afólk er í vanda fyri at fáa hæddarræ›slu, men fuglakompositiónin hevur ein møguleika

Mynd: Jens Kristian Vang

Tróndur bí›ar spentur

Brátt Tróndur fær Patursson svar uppá, um ætla›a verkætlan hansara í Kastrup gerst veruleiki, men hæddarræ›sla for›ar ætlanunum

Dagfinn Olsen

Listama›urin og ævint‡rarin Tróndur Patursson er kendur úti í heimi. Hevur m.a. n‡liga s‡nt fram í París.

Tróndur hevur veri› virkin uttanfyri landoddarnar og leingi hevur veri› arbeitt vi› einum verki, i› eftir ætlan skal pr‡›a um í Kastrup í Danmark. Tróndur situr spentur vi› telefonina í hesum tímum, tí avger›in hesum vi›víkjandi kann falla hvørja løtu.

Flogvøllur og hæddarræ›sla

Tó er greitt, at talan ver›ur ikki um ta› so kenda spegilsrúmi›, kosmiska rúmi›, ella naka›, i› minnir um ta›. Hetta lá annars eisini í ætlanunum.

Listará›i›, i› tekur avger›irnar, hevur tó mett, at hetta er ikki skilagott. Meting teirra er, at ikki er rá›iligt at hava slíkt rúm á einum flogvølli, har fólk eru ávegis í flogfør og í luftina.

Orsøkin er sambært listará›num, at fólk kunnu fáa hæddarræ›slu av rúminum og hetta ver›ur ikki mett rá›iligt á einum flogvølli.

- Men so er ta› fuglakompositiónin, i› tykist hava møguleikar, sigur ein spentur Tróndur Patursson.

Biskuppur mótmælti

Tróndur hevur eisini leingi arbeitt vi› eini ætlan, har hann skal gera glaslist til eina kirkju í Newcastle. Her eru tó trupullreikar og ógreitt er, hvussu ver›ur.

Listará›i› á sta›num hev›i tiki› játtandi avger› og fígging var fingin til vega. Men so mótmæltu biskuppur og prestar, tí hildi› var›, at ætlanirnar samsvara›u ikki vi› søguna og ta›, i› pr‡ddi kirkjuna frammmanundan.Ávís myndevni pr‡›a kirkjuna og Tróndur hevur eisini myndevni úr bíbilsøguni. Men hóast abstarkkt list er í kirkjni, so ynsktu mótmælararnir ikki meira av hesum og vildu tryggja seg.

Ta› stendur í botni, men Tróndur umhugsar at gera broytingaruppskot, men spurningurin er um ta› loysir seg og hvussu langt ein skal ganga á ney›semjuvegnum, heldur Tróndur, sum eisini minnir á, at ofta er nógv spæl aftanfyri leiktjøldini í slíkum ætlanum.

Møguliga ver›ur komi› til eitt úrslit til jóla vi›víkjandi ætlanunum í Newcastle, men stø›a ver›ur tikin um ætlanirnar í Kastrup í hesum tímum og í Kirkjubø bí›ar Tróndur spentur vi› telefonina.

Microsoft á sámiskum

Málkøn fólk hava ofta havt á munni, at teldutøknin avskeplar máli›. Tey meyla, tjatta, logga av, seyva og delita. Máli› skapar eina gjógv millum ung og gomul, føroyskt og fremmant, ver›ur sagt. Eisini sámar kenna til henda trupulleika. Fyrsta dagin ver›a sámiskir stavir tøkir, tá umræ›ur forrit frá Microsoft. Sámisku stavirnir fara fyrstu fer› at bleiktra á skíggjanum, tá Sámatingi› flytir í n‡ggj høli í Karasjok har nor›uri í Noregi. Sámatingi› hevur leingi arbeitt mi›víst vi› at tryggja sámiskum stavum innivist í telduskráum. Kann henda, at hetta kann ver›a vi› at tryggja eitt hótt mál. Eli Skogerbø á lærda háskúlanum í Oslo hevur sta›i› fyri kanningini, sum nevnist "Samiske medier — innhold, bruk og rammevilkår", har sagt ver›ur, at bert helmingurin av sámiska fólkinum skilir sámiska máli›. Sámar eru upprunafólk, sum í Noregi ætlandi fevna um 30.000 til 50.000 fólk. Sámiskt er b‡tt sundir í fleiri mál. Í Noregi ver›a n‡tt nor›ursámiskt, lulesámiskt, su›ursámiskt og eystursámiskt, ella skoltesámiskt mál.

Nor›ursámiskt mál ver›ur n‡tt í sámisku blø›unum eins og í Sámaútvarpinum, sum er skipa› undir NRK. Nor›ursámiskt ver›ur eisini n‡tt í umsitingini og sum mó›irmál hjá fleiri, i› búgva í innaru Finnmørkini og í pørtum av Troms. Í kanningini hjá Eli Skogerbø ver›ur sta›fest, at ta› er einans í Karasjok (82 %) og í Kautekeino (90%) at tey, sum har búgva, tala sámiskt mál heima. Sjálvt í hesum mest sámisku kommunum, eru ta› einans .

ERT TÚ KRING/UR Í TØLUM

So er tað kanska júst tær, vit sóknast eftir. Talan er um eitt avbjóðandi og nýskipað starv, so tann, sum settur verður, kemur í stóran mun sjálv/ur at skipa innhaldið í starvinum.

Tann setti kemur at arbeiða í sera tøttum samstarvi við virkisleiðaran, og kemur at fylgja við dagligu framleiðsluni. Høvuðsuppgávan verður at gera dagsroknskapir fyri allar framleiðslur á virkinum.

Virkið er vælútbygt við ymiskum telduskipanum, sum verða brúktar til skráseting av nøgdum, lønartímum o.ø. Hesar skipanir skal tann setti nýta og menna, so tær altíð hóska so væl til virkið sum tilber.

Umframt at vera kring/ur í tølum ynskja vit:

- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- at tú hevur góðan kunnleika til teldu

Tað er ein fyrimunur um tú hevur útbúgving frá Fiskivinnuskúla ella Hægri Handilsskúla. Hetta er tó eingin treyt. Somuleiðis er tað ein fyrimunur, at tú hevur royndir frá líknandi starvi.

Til rætta umsøkjaran bjóða vit góða løn og góðar starvstreytir.

Fleiri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 441002 og tosa við Jógvan Gregersen.

Umsóknarfreistin er 15. november 2000.

Umsóknirnar, ið verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast til:

P/F Fiskavirkið framleiðir saltfisk, feskar fiskaúrdráttir og kryvur laks og síl til útflutnings. Felagið hevði í 1999 115 ársverk og ein umsetning uppá 87 mio. kr.

SANSIR TEL 355 355

FISKAVIRKIÐ

P.O. Box 29 · FO-510 Gøtu · Faroe Islands
Tel +298 441002 · Fax +298 441766

Maskinmeistari søkist til Elfelagi› SEV

Starvi›:
Talan er um eitt starv sum vaktgangandi maskinmeistari á Fossáverkinum í Vestmanna. Undir Fossáverki› hoyra eisini Heygaverki›, M‡ruverki› og Ei›isverki›. Hesi verk ver›a st‡rd frá Fossáverkinum. Harumframt st‡rir vakthavandi á Fossáverkinum b‡ti› av framlei›sluni millum elverkini, herundir eisini Sundsverki› og Strond (lastfordeiling).
Eisini ver›a linjurnar og koblingsstø›irnar st‡rdar ha›ani (koblingslei›sla).

Útbúgving:
Til starvi› krevst full maskinmeistaraútbúgving ella onnur útbúgving, sum gevur í minsta lagi tilsvarandi maskin- og elektrotekniskan kunnleika.

Lønin:
Starvi› er lønt sambært VI. lønarflokk eftir sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagi›.

Nærri uppl‡singar:
Nærri uppl‡singar um starvi› kunnu fáast vi› at venda sær til SEV í Tórshavn (Bjarki Hermansen ella John P. Danielsen) ella til SEV í Vestmanna (Pól Joensen).

Umsóknir:
Umsóknir skulu saman vi› avriti av prógvum og møguligum ummælum sendast til Elfelagi› SEV, Box 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 3. november 2000.

Elfelagi› SEV

Barnsbur›ar-avloysari søkist

Søkt ver›ur eftir avloysara fyri dagrøktarmammu vegna barnsbur›arfarloyvi.

Nærri uppl‡singar starvinum vi›víkjandi fáast frá Dagrøktarskipanini á tlf. 44 85 94.

Skrivlig umsókn skal vera Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 10. nov. 2000.

Runavíkar Kommuna.

Dagrøktarskipanin í Runavíkar kommunu
Hei›avegur
600 Saltangará

High School og Au-pair

Upplýsandi fundur um High School og Au-pair uppihald í útlandinum verður á Landsbókasavninum 31. okt. Foreldur og systkin kunnu vera við.

STS High School kl. 19.30.

STS Au-pair kl. 20.30.

STS

STS High School og Au-pair
Føroya umboð tel. 318805

Sosialurin - 311820

Frá 1000 ára haldinum

Leygardagin 28. oktober kl. 19.00 ver›ur kirkjukonsert (sálmar) í Skála Kirkju.

Sunnudagin 29. oktober kl. 16.00 ver›ur kirkjukonsert (sálmar) í Glyvra Kirkju.

Sunnudagin 29. oktober kl. 19.30 ver›ur kirkjukonsert (sálmar) í Elduvíkar Kirkju.

Sangur: Petra Iversen
Piano: Stamen Stantchev
Kontrabass: Edvard Nyholm Debess

FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR
Postboks 1121 · tlf. +298 321132
+298 321761 · FO-110 Tórshavn

1000

Hjálpargrunnurin fyri óarbei›sførar fiskimenn

Umsóknarblø› til grunnin fáast vi› at skriva til: **Postboks 2114, FO-165 Argir**, ella at ringja á tlf. 316089 (svarar eftir arbei›stí›) ella leggja bo› á telefonsvararanum.

Umsóknir til hjálpargrunnin mugu vera grunninum í hendi í seinasta lagi hósdagin 7. desember 2000.

Hjálpargrunnurin